TRYGGINGARFELAGIÐ LÍV
Postboks 206
Óðinshædd 11
FO-110 Tórshavn
Tel. 31 11 11
liv@liv.fo
www.liv.fo

# Áheitan sjálvboðið eftirlønargjald

Navn:
P-tal:
Bústaður:
Postnr.:
Býur/Bygd:
Telefon:
Teldupost:

## Inngjald

| Gjald kr: | **Áðrenn eftirlønarskatt** |
| --- | --- |

Tilmelding til gjaldskipan | Skrás.nr.: | Kontonr.:

*Tað er umráðandi at boða LÍV frá um konto nr. verður broytt

Mánaðarliga ☐ Kvartárliga ☐ Hálvárliga ☐ Heilárliga ☐

## Tilskilan

**Útgoldið verður til "næsta avvarðandi" um tú ikki hevur givið okkum boð um annað.**

*Næsti avvarðandi er í fyrsta lagi hjúnafelagin.*
*Er eingin hjúnafelagi, verður útgoldið til børn, íroknað ættleidd børn.*
*Um eingi børn eru, verður útgoldið sambært arvalógini/testamenti.*
*Legg til merkis, at ein møguligur sambúgvi er ikki fevndur av hugtakinum "næsti avvarðandi" í hesum høpi.*

**Er hetta ikki í tráð við títt ynski, er tað lætt og ómakaleyst at broyta tilskilan.**
**Oyðiblaðið, ið tú skalt útfylla og senda okkum finnur tú á heimasíðu okkara www.liv.fo/tilskilan**

TRYGGINGARFELAGIÐ LÍV
Postboks 206
Óðinshædd 11
FO-110 Tórshavn
Tel. 31 11 11
liv@liv.fo
www.liv.fo

# Vel títt váðastøðið




Tú kanst velja ímillum fýra ymisk váðastøði.
Tey eru úr lítlum váða upp í stóra váða, og tú kanst altíð broyta váðastøðið uttan kostnað.
Útgangsstøðið er, at allir kundar byrja við miðal váða.

Í høvuðsheitum sveiggja tær meiri váðafullu íløgurnar, t.d. partabrøvini, mest í virði, men afturfyri geva partabrøvini størri avkast sum frá líður. Lánsbrøvini sveiggja minni, tí váðin er minni og tryggjar støðufesti í íløgusamansetingini.

Tá ið 15 ár eru eftir til eftirlønaraldur minkar váðin leypandi fyri hvørt ár sum fer.
Váðin minkar leypandi á váðastøðunum varið, miðal og høgt. Váðin minkar ikki á váðastøðinum partabrøv.

Er 'títt váðastøðið í dag' ikki í tráð við títt ynski, er tað lætt og ómakaleyst at broyta váðastøðið.
Oyðiblaðið, ið tú skalt útfylla og senda okkum finnur tú á heimasíðu okkara www.liv.fo.
Tú kanst lesa meira á www.liv.fo/uppsparing

# Undirskrift

- Við undirskrift míni verður givið heimild til, at LÍV stovnar gjaldsavtalu um beinleiðis gjalding av kontuni, ið eg havi upplýst omanfyri.
- Mær er greitt, at eg havi skyldu at boða LÍV frá, um kontonummarið broytist.
- Undirritaði/a er kunnað/ur um, at uppsparingin verður stovnað við marknaðarrentu, og at tað tí eisini er møguleiki fyri einum negativum avkasti í ávísum tíðarskeiðum.

Dagfest ____________________ Undirskrift ____________________

TRYGGINGARFELAGIÐ LÍV
Postboks 206
Óðinshædd 11
FO-110 Tórshavn
Tel. 31 11 11
liv@liv.fo
www.liv.fo

# Faktablað

**Áheitan sjálvboðið eftirlønargjald**

## Ásetingar

- Goldið verður inn umvegis Gjaldsskipanina.
- Ókeypis stovnan.
- Árligt umsitingargjald er 150 kr. umframt 2,5% av leypandi inngjøldum.
- Inngoldið verður eins og valda áseting við tekning.
  *Mánaðarliga, Kvartárliga, Hálvárliga ella Heilárliga.*
- Inngoldin eftirlønargjøld eru fevnd av eftirlønarlógini.

## Marknaðarrenta

- Uppsparingin verður stovnað við marknaðarrentu.
- Við marknaðarrentu fært tú tann ágóðan, sum marknaðurin gevur. Í góðum tíðum fært tú allan ágóðan av góðu gongdini. Møguleikin er tó fyri negativum avkasti í ávísum tíðarskeiðum, tá tað gongur minni væl.

## Skattur

- Inngjaldið verður goldið sum ein upphædd áðrenn eftirlønarskatt.
- Útgjaldið er skattafrítt.

**Minst til:**
**Tá broytingar henda í tíni lívi, er skilagott at kanna um broytingar skulu fremjast í tínum tryggingarviðurskiftum.**

TRYGGINGARFELAGIÐ LÍV
Postboks 206
Óðinshædd 11
FO-110 Tórshavn
Tel. 31 11 11
liv@liv.fo
www.liv.fo

# Dátuverndarkunning

LÍV er dátuábyrgdari, tá ið tað snýr seg um tær upplýsingar, ið vit viðgera um teg. Niðanfyri er serstøk kunning um tær viðgerðir LÍV fremur í sambandi við, at tú sum kundi teknar sjálvboðið eftirlønargjald í LÍV.

Henda serstaka kunning er einans galdandi, tá ið henda áheitan um sjálvboðið eftirlønargjald verður nýtt. Afturat er almenna dátuverndarkunningin, ið leinki er til niðanfyri, galdandi.

**Áheitan**
Í sambandi við, at tú fyllir hesa áheitan út um at tekna sjálvboðið eftirlønargjald, skrásetur LÍV hesar upplýsingarnar í sínum skipanum, soleiðis at LÍV kann skráseta teg sum kunda og tekna valdu uppsparing.

**Hvørjar persónsupplýsingar skráseta og brúka vit:**
- Navn
- Bústað
- P-tal
- Telefon
- Teldupostur
- Inngjald
- Kontonummar

**Endamál**
Endamálið við viðgerðini av upplýsingunum er at avgreiða og umsita tína áheitan og avtalur um tekning av sjálvboðið eftirlønargjald (uppsparing).

**Viðgerðarheimild**
Fyri at LÍV skal kunna viðgera persónsupplýsingar um teg skal heimild vera til tess. Heimildin til hesa áheitan og viðgerðina aftaná er at finna í dátuverndarlógini, stytt DVL, § 8, stk. 1, nr. 2. Viðgerðin er neyðug fyri at halda eina avtalu, sum tú er partur í ella fyri at gera tað, sum eftir áheitan frá tær er neyðugt, áðrenn avtalan verður inngingin.

LÍV hevur heimild til at nýta títt p-tal til eintýdda merking, sambært fíggjarlóggávuni.

**Móttakarar**
Sambart álagdari upplýsingarskyldu, so letur LÍV upplýsingar um teg til TAKS.

**Nærri upplýsingar um rættindi v.m.**
Upplýsingar viðvíkjandi striking og tínum rættindum finnur tú í almennu dátuverndarkunningunum hjá LÍV. Tær síggjast her:

- LÍV: https://liv.fo/datuverndarkunning

Á oman fyri nevndu leinkju finnur tú eisini upplýsingar um, hvussu tú setur teg í samband við LÍV, umframt upplýsingar um kærumøguleikar.